gult cyan magenta svart

VE‹RI‹

Petur Skeel Jacobsen, ve›urfrø›ingur grei›ir frá um ve›ri›



Ve›ri› í dag:
Lot til andøvsgul av eystri og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.



Ve›ri› hósdagin:
Lot til andøvsgul av eystri ella av ymsum ættum og regn av og á. Um kvøldi› veksur hann vindin av su›ri. Hitin millum 5 og 8 stig.



Ve›ri› fríggjadagin:
Hvassur vindur ella skri› av su›ri og ladsynningi og regn. Um kvøldi› minkar hann vindin og yvirhøvur turt. Hitin millum 7 og 10 stig.

Ve›ri› leygardagin og sunnudagin:
Hann minkar vindin ni›ur í andøvsgul av útsynningi, og snarar eitt skifti í nor›an og landnyr›ing. Ælave›ur og onkur sólglotti og hitin millum 6 og 10 stig.

Næmingar eru lærarar

10. floks næmingar skulu í tríggjar dagar undirvísa ísta›infyri at ver›a undirvístir. Ta› dámar teimum avbera væl, og uppmøtingin er gó›
Mynd: Álvur Haraldsen

Teir eldru næmingarnir í Eysturskúlanum í Havn skulu í tríggjar dagar undirvísa í yngru flokkunum

Stefan í Skorini

Hugagó› eru tey. Teir eldru næmingar, me›an teir ganga millum bor›ini og leggja teimum smáu lag á. Um ta› er 3+3 ella ása sá á, hava tey eldru altí› svar upp á spurningin, sum teir yngru næmingarnir seta teimum.

Eldru næmingarnir hava nevniliga fingi› møguleikan at undirvísa í nakrar dagar. Orsøkin til hetta er, at fleiri av vanligu lærarunum eru í Íslandi á skei›i. Hetta kundi givi› fleiri frítímar, men skúlastjórin heldur ta› vera eitt sindur óheppi›, at so nógvir næmingar ganga fyri einki. Tí eru teir ísta›in settir sum vikarar fyri lærararnar, sum eru í Íslandi.

Talan er um fjúrtan lærarar, sum eru á skei›i í verkætlanararbei›i í Íslandi. Hetta er n‡ggj kravd uppgáva í ár.

Eydis Baldvinsson, sum er skúlastjóri í Eysturskúlanum, sigur, at tey hava so stóra framhaldsdeild á skúlanum, og tí hev›i tali› av næmingum, sum høvdu havt frí, veri› stórt og kanska órógva a›ra undirvísing.

Hon heldur hetta vera eitt stuttligt tiltak, og kanska er ta› vi› til at sjó›a tey eldru og yngru betur saman. Ta› er annars ofta solei›is, at tey yngru næstan ræ›ast næmingarnar í teimum hægru flokkunum.

Næmingarnir fara saman í bólkum, sum telur tríggjar ella f‡ra næmingar, inn til flokkarnar at undirvísa. Skúlastjórin vísir á, at tey yngru tó ikki eru slept uppá fjall, tí lærararnir hava eftirlit vi› teimum flokkum, har eingin ordiligur lærari er. Ofta hjálpa næmingarnir lærarunum, sum undirvísa flokkinum. Ta› eru bara næmingar úr 10. flokki, sum sleppa at undirvísa, og teir fara at vera í flokkunum frá 1. til 6.

Eldru næmingarnir dáma avbera væl at undirvísa, og allir møttu tí›liga t‡smorgunin, tá teir skuldu undirvísa, og ta› er kanska ikki vanligt. Uppmøtingin ver›ur óiva› betri, nú teir sjálvir skulu undirvísa ísta›infyri at sita á skúlabeinki.

Um lærarnir gerast arbei›sleysir, tá teir leggja lei›ina heimaftur úr Íslandi sigur søgan tó einki um. Kanska skuldu tey yngru sjálv gjørt av, hvørt tey vilja hava teir gomlu lærarnar aftur, ella tey vilja halda fram vi› næmingum sum lærarar.

Hitalagi› kring knøttin

Illulisat	÷1
Nuuk	÷2
Qaqortoq	÷1
Ammassalik	÷1
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	4
Sey›isfjør›ur	6
Tórshavn	9
Lerwick	10
Aberdeen	12
London	15
Tromsø	3
Bergen	11
Oslo	–
Stokkhólm	9
Keypmannah.	12
Helsinki	10
Moskva	7
Berlin	12
Warzawa	15
Kiev	8
Bukarest	9
Paris	17
Madrid	21
Róm	21
Malorca	22
Athen	16
Malta	22
Tunis	22
Beijing	14
New Dehli	31
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	–
New York	14
Miami	25
Los Angeles	23
Meksikob‡ur	–
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	16

LUFTTR†STI‹



Lágtr‡sti› vi› Føroyar fer í landnyr›ing og lágtr‡sti› í útsynning úr Írlandi kemur móti Føroyum.



Lágtr‡sti› vi› Føroyar fer eystureftir, men eitt lágtr‡st eystanfyri New Foundland kemur henda vegin og d‡pist nógv.

HITALAGI‹



Hitalagi› mált frá 23/10 kl. 06⁰⁰–24/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,9° Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

AVFALL



Avfalli›: 3,2 mm – mált frá 23/10 kl. 06⁰⁰–24/10 kl. 06⁰⁰
Avfalli› higartil í oktober: 100,4 mm

VESTFALLSKYRRINDI

	Dagur	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.	Su›uroyar-/ Vágafir›i fp.	sp.
19. okt.: Mánin næst jør›ini	25. okt.	05.54	18.15	04.54	17.15	05.09	17.30	07.54	20.15	08.54	21.15	04.09	16.30	03.09	15.30	06.09	18.30	07.09	19.30	05.39	18.00	06.54	19.15
20 okt.: Seinnakvarter	26. okt.	06.35	18.53	05.35	17.53	05.50	18.08	08.35	20.53	09.35	21.53	04.50	17.08	03.50	16.08	06.50	19.08	07.50	20.08	06.20	18.38	07.35	19.53
27. okt.: Tendring	27. okt.	07.10	19.27	06.10	18.27	06.25	18.42	09.10	21.27	10.10	22.27	05.25	17.42	04.25	16.42	07.25	19.42	08.25	20.42	06.55	19.12	08.10	20.27
	28. okt.	07.44	20.03	06.44	19.03	06.59	19.18	09.44	22.03	10.44	23.03	05.59	18.18	04.59	17.18	07.59	20.18	08.59	21.18	07.29	19.48	08.44	21.03